# Ómøguligar umstøður

## Framstig hava verið, men vánaliga fíggjarstøðan í felagnum hóttir støðugt arbeiðsumstøðurnar hjá Henrik Larsen. Stjórin í felagnum lovar tó batar



Við enska Clive Stapleton sum fíggjarligum garanti skuldi Køge taka stigið upp til tey stóru í Danmark. Og helst skuldi hetta gerast í eini samanlegging við fyrrverandi donsku meistararnar úr Herfølge. Baklandið í teimum báðum grannafeløgunum vildi tó ikki tað sama sum enski ríkmaðurin, og tí takkaði Stapleton at enda fyri seg.

Hóast holið í pengakassanum var gapandi stórt, so gekk tað sum eftir ánni fyrstu mongu dystirnar hjá Henrik Larsen, eftir at hann í fyrraárið varð settur sum venjari hjá felagnum.

Í vetrarsteðginum var liðið á odda, men fíggjarliga óskilið kostaði. Í fyrstu atløgu fekk Køge frátikið stig, tí felagið megnaði ikki fíggjarligu skyldur sínar. Og í øðrum lagi rýmdu fleiri av profilunum í hópinum til fíggjarliga sterkari feløg.

Køge hóðraði tó væl og virðiliga undan í donsku 1. deild, og hóast fíggjarligu trupulleikarnir eitt nú merkja, at felagið enn ikki hevur loyvi at gera veruligar yrkissáttmálar við spælarar sínar, so hevur leiðslan stórt álit á Henrik Larsen.

- Tað hevur sera nógv at siga fyri okkum, at vit fingu nýggjan sáttmála við Henrik. Hann hevur verið í felagnum í eini sera truplari tíð, men hevur kortini alla tíðina hildið høvdinum høgt. Og tað er eingin loyna, at vit komandi árini ætla at blanda okkum í oddastríðið í 1. deild, segði stjórin í felagnum, Jørn Rasmussen, tá nýggjur sáttmáli varð gjørdur við Henrik Larsen.

Hann sigur annars, at tey í felagnum støðugt arbeiða við at betra um fíggjarpartin. Og at tey rokna við, at hetta eisini kemur í rættlag um ikki alt ov langa tíð.

Sáttmálin við fyrrverandi føroyska landsliðsvenjarin er galdandi fram til summarið 2010.

----------------------------------------

*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

# Nygaard hugsar um danska landsliðið

## Hálvi tvørámaðurin Marc Nygaard er komin aftur til Danmarkar at spæla fótbólt, og hann hevur framvegis ambitiónir um at koma á danska landsliðið



Seks ferðir hevur Marc Nygaard spælt á danska landsliðnum, men seinasti dysturin var fyri seks árum síðani.

Nú er tann høgi álopsspælarin við føroyskum ættarbondum komin aftur til Danmarkar at spæla, eftir at hann í nógv ár hevur ferðast sum fótbóltsspælari í Europa. Seinast spældi hann fyri enska felagið QPR.

- Eg havi ambitiónir um at koma aftur á landsliðið. Eg eri framvegis væl fyri og svangur, og tað er eisini tí, at eg valdi at koma heim júst nú, sigur Marc Nygaard.

Hann umboðar nú felagið Randers, og har skal hann royna at skjóta seg inn í landsliðshitan aftur.

**Ferðast víða**

31 ára gamli Marc Nygaard spældi ungdómsárini við B93 í Keypmannahavn, og kappingarárið 1994/95 spældi hann fyri FCK. So fór hann av landinum at spæla, og hann hevur umboðað feløgini Heerenveen, Maastricht, Roda, Excelsior, Brescia og Queens Park Rangers.

- eg kenni ikki rættiliga støðið og spælararnar í donsku kappingini longur, tí eg havi verið uttanlands í 13 ár, men eg gleði meg nógv til at spæla í Danmark aftur, og eg havi roynt at spurt meg fyri um donsku kappingina, segði Marc Nygaard undan fyrsta dystinum hjá sær fyri Randers í superliguni fyri tveimum vikum síðani.

- Hetta er sum at koma til eitt nýtt land at spæla fótbólt, tí nógv er broytt í Danmark hesi 13 árini, eg havi verið uttanlands. Eg skal líka læra at spæla saman við liðfeløgunum og ímóti hinum liðunum, men kanska er tað eisini ein fyrimunur hjá mær, at hinir spælararnir ikki kenna meg so væl, sigur hann.

----------------------------------------

*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

# Aftur í Íslandi

## Símun Samuelsen er nú aftur í Íslandi eftir hálvt ár í norskum fótbólti

**Fleiri vórðu bilsin, tá Símun í fjør summar valdi at royna eydnuna í norskum fótbólti.**

**Í Keflavík hevði vágbingurin verið fastur maður á liðnum, sum støðugt royndi at bjóða av í íslendska toppinum. Og skoðsmálini í fjølmiðlunum góvu greitt til kennar, at talan var um ein av týdningarmestu spælarunum á liðnum.**

**At skiftið til Noreg gjørdist aktuelt bendir eisini á, at áhugin fyri føroyska spælaranum er stórur, og tað váttar umboðsmaður hansara eisini.**

**- Tað var samband millum Keflavík og Notodden í vetur, men feløgini funnu ikki nakra semju, og tí er Símun aftur í Keflavík. Har hevur hann so sáttmála hetta kappingarárið, og so mugu vit síggja, hvussu leikur annars fer, sigur Jákup í Stórustovu, sum er umboðsmaður hjá flestu av føroysku útisetunum.**

**Og eingin ivi er um, at tað eru góð boð hjá venjaranum hjá Keflavík, at hann nú aftur hevur Símun í hópinum. Vágbingurin verður roknaður sum fastur maður í hópinum hjá felagnum, sum aftur í ár hevur ætlanir um at bjóða av heilt frammi í oddinum.**



***Einasti føroyski útisetin í íslendskum fótbólti er eitt av sterkastu kortunum hjá Keflavík***